Danny Baldursson

Danny and The Veetos

LÍVIÐ SKAL IKKI TAKAST FOR SERIØST

Hann er glaður. Heilt inn á hjartað glaður. Fyri lívið, fyri allar teir nógvu møguleikarnir og fyri fjølbroytni, sum hevur víst seg at ganga aftur hjá honum. Og so er hann so sjarmerandi, at tú kanst ikki annað enn fella fyri honum. Í øllum førum eitt lítið sindur. Brúnu og livandi eyguni glógva, tá hann fortelur um tað, sum hann brennur allarmest fyri. Nevniliga tónleikinum. Og so verður tað heldur ikki verri av, at hann er oddamaður og sangari í allarhelst best umtókta føroyska tónleikabólkinum í løtuni

RAGNHILD ELLINGSGAARD

Hann er ovurviðkvæmur. Ikki bara eitt lítið sindur, men hann tolir næstan einki. Hvørki sól, fisk, haslinøtur ella luktilsi. Verður hann stungin av eini býflugu, so doyr hann. Harumframt hevur hann sjúkuna atopisk dermatitis, sum ávirkar bæði húð og kropp. Tí má hann ikki verða stressaður, tí tað tolir hann heldur ikki.

Men einki av hesum sæst á Danny, tá eg hitti hann til ein heitan kaffimunn á kaffistovuni Jacqson í miðbýnum í Klaksvík. Ella, tað vil siga, at eg drekki kaffi. Sjálvur drekkur hann bara vatn. Hann roynir at vera sunnur, sum hann sigur við einum lítlum skálkabrosi. Uttanfyri fara bilarnir skjótt framvið, meðan kirkjuklokkan við sínum syngjandi sløgum sigur okkum, at dagurin longu er hálvrunnin. Inn kemur ein riðil av útlendskum ferðafólkum, sum øll hálvgum rópa í holið á hvør øðrum. Tey eru væl nøgd og stuttleika sær saman. Gott nokk er tað bara týskvøld, men eingin ivi er um, at summarfrítíðin longu er byrjað. Í øllum førum hjá teim flestu.

> *Viðhvørt skilji eg ikki ordiliga, hvussu øll bara kunnu vera so fantastiska fitt. Er tað ikki snedigt? Altso, eg meini tað. Øll eru bara so... deilig, haldi eg!«*
>
> *Danny Baldursson*

Gev mær eitt high five

Danny sjálvur letur seg tó ikki ávirka av allari málageipanini, sum er rundan um okkum. Tað kann væl vera, at hann ikki tolir sól. Tað stressar kroppin hjá honum, sum hann sigur. Men so er at taka sakina í egnar hendur og bara verða ein sól. Tí tað er ungi maðurin, sum situr hinumegin borðið við vatnglasinum í hondini. Ein heit og lívgevandi sól. Eingin ivi um tað. Hann flennir í heilum, fortelur stuttligar smásøgur um alt millum himmal og jørð og flennir so aftur.

Sjarmerandi sum fáur við livandi, brúnum eygum. Hann flennir eisini, tá eg knappliga finni útav, at bandupptakarin, sum skuldi banda samrøðuna hjá okkum, er slóknaður. Aftaná bara 23.48 sekund er einki komið á band. Og her hava vit sitið og tosað í næstan ein tíma. Eg kenni, at hitin spakuliga hórar seg upp eftir hálsinum hjá mær og fer víðari út í andlitið. Nei, tað kann ikki passa!, hugsi eg fyri meg sjálva. Tað ber ikki til! Men Danny? Hann er púra kaldur, hyggur eftir bandupptakarinum og brestur út úr at flenna. Eg biði um umbering og skilji einki av hesum. Men hann flennir bara víðari, rystir við høvdinum og vissar meg um, at hetta bilti einki. Slett einki. Tí, sum hann sigur, um ikki annað hava vit havt eina hugnaliga løtu saman. Hann rættir hondina út til eitt »high five«. Og sum vit sita her, hvør sínu megin lítla kafeborðið, er ikki trupult at skilja, at flest allar ungar (og uttan iva fleiri tilkomnar eisini!) gentur í Føroyum eru eitt sindur smáforliptar í hesum unga manninum úr Klaksvík.

Litfagurt og popput konfetti

Men hvør er hann? Hvør er ungi maðurin aftanfyri allan sjarmuna og tey smílandi brúnu eyguni? Sjálvur ivast Danny ikki eina løtu, tá eg seti honum spurningin.

Framhald á næstu síðu



– Eg elski at spæla og eg elski tónleikin hjá okkum. Tí er tað eisini mega lekkurt, at onnur eisini tíma tað, sum vit gera, sigur Danny Baldursson

MYND: EYDBII MYNDIR

– Tónleikari! Eg eri fyrst og fremst tónleikari, svarar hann skjótt og leggur afturat, at hjá honum situr tónleikurin í øllum kroppinum, í høvdinum og ikki minst í sálini. Uttan tónleikin var hann einki, leggur hann eitt sindur stillisligari afturat. Og um orð kundu talað, so hevði eg beint her skrivað byrjanina til kanska kendasta lagið hjá tónleikabólkinum Danny and The Veetos, Eitt Sunnukvøld Í Mai. Og so hevði tú latið teg tøla av vakra ljóðinum av litføgrum konfetti, sum spakluliga regnaði oman yvir teg. Popput, men eisini eyðmjúkt. Hoppandi, men eisini við beininum fast niðri á jørðini. Bólkurin er kanska tann best umtókti føroyski tónleikabólkurin í løtuni og telefonin hjá Danny ringir eisini allatíðina. So verður skipaði fyri onkrari konsert og hevði tað ikki verið akkurát nakað fyri teir at spælt? Ella skipar onkur fyri polterabend og tað hevði verið so fantastiska stuttligt, um Danny kundi spælt tvey-trý løg fyri brúðrini. Ella kanska er tað onkur føðingardagur, sum líka manglar handan eyka prikkin yvir i'num, sum Danny kundi givið teimum við nøkrum væl valdum løgum. Og Danny svarar telefonini og tosar frískur við øll, sum ringja. Her eru ongar primadonnulótur at hóma nakrastaðni. Eg spyrji hann, um tað ikki er strævið at skula svara øllum hesum fólkum. Men tað heldur hann als ikki.

– Strævið? Nei, hvussu hundan kann tað vera stævið, at onnur vilja hava meg at gera meira av tí, sum eg elski?, sigur hann. Skálkaliga brosið er aftur har og so flennir hann aftur. Og verður so aftur heldur meira álvarsamur.

– Nei, seriøst. Eg elski at spæla og eg elski tónleikin hjá okkum. Tí er tað eisini mega lekkurt, at onnur eisini tíma tað, sum vit gera. Annars kundu vit slett ikki liva hetta fantastiska lívið, sum vit gera beint nú, sigur hann hugsunarsamur og leggur so argandi afturat, at tað hevði verið munandi rotnari at sitið einsamallur í onkrum kjallara og bara spælt fyri sær sjálvum, tí at eingin tímdi at lurta.

– So vil eg heldur standa á einum palli. Ella í onkrari veitslu. Ella bara í eini svimjihøll. sigur hann og sipar til dagin herfyri, tá bólkurin spældi fyri eini komandi brúður í svimjihøllini í Klaksvík.

Flog undir veingirnar

Dreymarnir røkka tó munandi longri enn til bert at spæla til tiltøk og konsertir í heimlandinum. Fyri stuttum var bólkurin á ferð í Grønlandi, har teir millum annað spældu í høvuðsstaðnum Nuuk. Tað var ein heldur løgin kensla, greiðir Danny frá, tí meðan áhoyrararnir í Føroyum allir syngja við til føroysku tekstirnar, so var øðrvísi á pallinum í Grønlandi. Her vóru føroysku tekstirnir óskiljandi fyri tey, sum lurtaðu, meðan ensku tekstirnir fingu veruligt flog á áhoyrarafjøldina.

– Tað var faktiskt ordiliga snedigt. Men samstundis eisini ein ótrúliga feit uppliving, sigur Danny og leggur afturat, at hendan ferðin veruliga setti ferð á dreymarnar um eitt altjóða gjøgnumbrot. Í løtuni brúkar bólkurin næstan alla tíðina í upptøkuhølum, har ein nýggj fløga verður spæld inn. Hon kemur væntandi á marknaðin til Summarfestivalin, har bólkurin eisini hevur eina framførslu á stóra pallinum. Fløgan skal so eisini brúkast sum eitt amboð til at røkka dreyminum um fleiri framførslur uttanlanda.

– Men ikki tí; vit taka tað nokso róligt hesum viðvíkjandi. Dreymurin er har og vit eru klárir til at arbeiða fyri sakini. So mugu vit taka tað harfrá, heldur Danny róliga fyri og fær sær ein smakk av vatnglasinum, sum stendur á borðinum. Sjálvur skal hann, saman við vinmanninum Páll, undir víðari lestur í Onglandi aftaná summarfrítíðina. Páll er eisini við í Danny and The Veetos, so hetta kemur at skapa eitt sindur av broyting fyri bólkin, sum annars burturav er mannaður við fólki, búsitandi í Klaksvík. Men tað fara teir eisini at klára, heldur Danny.

– Í dag ber alt til, so hatta verður eingin trupulleiki. Vit kunnu ikki lata vera við at spæla saman og gera tónleik, so ein lítil fjarstøða millum tvey lond megnar nokk ikki heilt at steðga bólkinum, leggur hann afturat.

Sólin í eygunum

Danny var 17 ára gamal, tá hann byrjaði at fáast við tónleik. Eldra systur hansara, Unn, hevði einaferð spælt gitar, men var seinni givin aftur og gav heldur ljóðførið víðari til yngra beiggjan. Hann tók eina akkord og hugsaði, at hetta kundi verið áhugavert at gjørt eitt sindur meira við. Tá helt hann nógv til í Húsinum, eitt savningarstað fyri ung í býnum, og har var so eisini eitt heilt studio, sum Danny fekk loyvi til at spæla sær í. Seinni fekk hann ein nýggjari gittar frá eldra beiggjanum, Bárður, og saman við lítlu systrini Klaru skrivaði hann lagið »Broken Mirror«. Lagið varð síðani spælt inn og eitt sjónbandalag framleitt – og so var leiðin líkasum løgd. Bæði lagið og eisini sjónbandalagið fingu góða undirtøku millum tey ungu í Føroyum og Danny Baldursson gjørdist eitt kent navn. Stóri týdningurin av at hava tey nærmastu við allan vegin hoyrist heilt týðiliga á Danny.

– Eg elski øll tey, sum eg havi rundan um meg, bæði familjuna, damuna og vinfólkini. Og eg kenni meg veruliga hepnan at hava so nógv deilig fólk í mínum lívið. Viðhvørt skilji eg ikki ordiliga, hvussu øll bara kunnu vera so fantastiska fitt. Er tað ikki snedigt? Altso, eg meini tað. Øll eru bara so... deilig, haldi eg!, sigur hann hugtikin. Og har var hon aftur. Tann heita og lívgevandi sólin í hansara eygum.

Kelar fyri detaljunum

Í 2013 var bólkurin Danny and The Veetos stovnaður og síðani tá er longu nógv vatn runnið í ánna. Sunnukvøld í mai, I Am Afraid og Jólanætur eru nøkur av løgunum, sum flest allir føroyingar helst kenna og teir ætla sær ikki at steðga her. Danny er bæði sangari og oddamaður í bólkinum og eingin ivi er um, at hann tekur uppgávuna í álvara.

– Eg eri faktiskt rættiliga kritiskur, tá vit hugsa um tónleikin, sum vit spæla. Typiskt tekur tað eitt sindur av tíð, áðrenn eg eri nøgdur við ein tekst ella haldi, at eitt lag situr nóg væl, fortelur hann og leggur afturat, at í slíkum løtum er hetta júst sum onnur arbeiði. Einki er »fínasta slag«, men alt skal verða væl gjørt. Tað skal kelast fyri detaljunum, sum Danny sjálvur tekur til.

Í dag er Danny 25 ára gamal, men hann hevur longu fleiri drúgvar royndir í viðførinum. Kanska fyrst og fremst sum tónleikari, men eisini sum sjónleikari. Millum annað hevur hann staðið á palli við sangleikunum Audition og Grease, eins væl og hann hevur roynt seg í fleiri kabarettum og sjónleikum í heimbýnum. Er tað nakað, sum hann ætlar at gera meira við, spyrji eg hann. Og enn einaferð kemur eitt hjartaligt flenn, áðrenn hann svarar mær spurninginum.

– Nei, í øllum førum ikki beint nú. Tónleikurin er tað, sum eg fyrst og fremst brenni fyri í hesum tíðarskeiðnum í lívinum hjá mær – men ikki tí, um onkur ringir frá Hollywood og bjóðar mær eina feita rollu, so skal eg nokk umhugsa støðuna. sigur hann við einum álvarsamum eygnabrá. Eg fangi meg sjálva í at hugsa, hvørt hann meinar hetta seriøst. Men so brestur hann út úr aftur. Og soleiðis er øll hendan løtan saman við Danny. Lívsgleðin situr í hvørjari kyknu, sum stendur til at bresta í berum ovfarakæti. Hann er simpulten so glaður allan vegin ígjøgnum og tað smittar. Eg merki tað eisini væl á borðgentunum, sum av og á koma yvir til borðið hjá okkum at vita, um alt er, sum tað skal vera. Hann tosar blídliga við tær, sigur okkurt stuttligt og tær fara at smílast. Tað geri eg eisini meginpartin av tíðini, sum vit sita saman við borðið.

Góða løtan

Við eini sjúku sum atopisk dermatitis og ovurviðkvæmi fyri næstan øllum kundi annars verið skjótt til bara at sett seg inn á eitt kamar at tikið synd í sær sjálvum. Eg veit eisini, at Danny sum smádrongur var nógv plágaður av sjúkuni, sum millum annað gav honum hervilig astmaherðindi. Men at taka synd í sær sjálvum ger einki gott, heldur hann og nevnir mammuna, sum altíð hevur stuðlað honum í øllum, sum hann hevur havt hug at takast við. Um tað so var at spæla á einum grasvølli í fleiri tímar undir heitari sól.

– Mamma tosaði ongantíð um, at tað var synd í mær. Hon brúkti heldur ikki tíð uppá at fortelja mær, at eg ikki mátti hetta ella hatta. Ístaðin lat hon meg gera tað, sum eg hevði hug til – og so máttu vit taka avleiðingar aftaná. Til dømis kundi eg verða sjúkur í eina heila viku, um eg kom í samband við gras ella djór. Og eg sigi vit, tí hon hevur sanniliga tikið sín part saman við mær. Tað er helst eisini frá henni, at eg havi lært at síggja so ljóst uppá tað heila. Lívið er altso for stuttligt og for deiligt til at skula takast for seriøst, sigur Danny at enda. Hann skal skunda sær til Havnar, tí har bíðar unnustan. Einki av samrøðuni kom á bandupptakaran, men Danny hevði púra rætt. Tað bilar einki, tí løtan var góð, meðan hon var har. Og tað er kenslan, sum vit kunnu taka við okkum, tá vit hava sagt hvør øðrum farvæl.

POST@SOSIALURIN.FO



Danny Baldursson úr bólkinum Danny and The Veetos

MYND: EYDBII MYNDIR

»Mamma tosaði ongantíð um, at tað var synd í mær. Hon brúkti heldur ikki tíð uppá at fortelja mær, at eg ikki mátti hetta ella hatta. Ístaðin lat hon meg gera tað, sum eg hevði hug til – og so máttu vit taka avleiðingar aftaná«

Danny and The Veetos

- *Bólkurin varð stovnaður í 2013 og hevur síðani tá havt eina ørgrynnu av framførslum, bæði í Føryoum og uttanlands.*
- *Teir, ið manna bólkin, eru Danny Baldursson (gitar/vokal), Páll Brim Joensen (ukulele/vokal), Jóhan Nolsøe (gitar), Robert Waagstein (trummur/vokal), Símun Dam (synth), Jógvan Fróðin Baldvinsson (bass/synth bass) og Rúni Hentze (trompet).*
- *Tónleikurin er ein samanrenning av góðum, gomlum fólkatónleiki og nýmótans elektroniskum poppi.*
- *Bólkurin er nevndur eftir kenda sjónleikaranum Danny DeVito. Robert, trummuspælarin, kom við navninum og tá allir í bólkinum hildu, at stuttligi maðurin hevði uppiborið at verða uppkallaður, so var støðan púra greið. Sjálvur sigur Danny, at hinir í bólkinum hildu, at Danny og Danny líktist so mikið nógv, at bólkurin skuldi navngevast eftir sjónleikaranum. Vit hava tó onga viðmerking fingið frá hinum í bólkinum um, hvørt hendan søgan er sonn ella ikki...*